## VÁTTAN

Áðrenn venjingin ella kanningin byrjar, er tað umráðandi, at vit fáa eina undirskrivaða váttan.

Váttanin gevur fysio- ella ergoterapeutum loyvi til at kunna geva neyðugar upplýsingar víðari til viðkomandi stovnar ella fakbólkar, somuleiðis gevur váttanin loyvi til savna neyðugar upplýsingar frá øðrum stovnum ella fakbólkum í sambandi við viðgerðina.



**MINNIST TIL:**
Avboð skal gevast á tlf. 343260

***Fysioterapeutar:***
Sára Olsen
Gurið Augustinussen
Sólvá Dimon
Edvard Nårstad

***Ergoterapeutur:***
Camilla Eið

***Heilsurøktari:***
Tórur Sørensen

Suðuroyar Sjúkrahús
www.ssh.fo ssh@ssh.fo
tlf. 34 33 00

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS
Innihaldið í hesum faldaranum er dagført 08/07/2023



# BARNA-FYSIOTERAPI

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

## BARNAVIÐGERÐ HJÁ OKKUM

- Hvat kunnu vit bjóða?
- Hvussu long er hvør viðgerðin?
- Hvussu long er viðgerðartíðin?
- Ráðgeving
- Gleðin við at brúka kroppin



## HVAT KUNNU VIT BJÓÐA?

Eftir ávísing frá lækna verður barnið innkallað til kanning.

Grundað á kanningarúrsliti ð verður ein ætlan løgd eftir tørvinum hjá barninum.

Venjingin verður tillagað barninum og fer fram í venjingarhølinum í fysioterapiini ella í nærumhvørvinum.

Venjingin er eina til tvær ferðir um vikuna í umleið tríggjar mánaðir. Eftir hetta steðgar venjingin, men tú kemur aftur til uppfylging.

Ein venjing er í 45 minuttir.

Fyri at fáa eina samanhangandi tilgongd, er tað av stórum týdningi, at barnið møtir til venjingarnar.

Meðan steðgur er í venjingini , er sera umráðandi at hildið verður fram við at venja heima, soleiðis at barnið framhaldandi mennist.

**KOM OG VEN**

## KANNING AV BARNINUM

Vit nýta hesar kanningarhættir:

- Si (Sansa Integratión)
- MAP
- Sensory Profile
- Annað viðkomandi.

Terapeutarnir kanna børnini fyri:

- sansa motoriskar trupulleikar
- niðursetta motoriska menning
- innlæringartrupulleikar
- motorisk órógv
- fínmotoriskar og kognitivar trupulleikar
- talutrupulleikar.

